Klaksvíkar Býráð 2013-2016

Dagfesting: 20.06.2013 kl. 17:30
Málnr.: 13/00245

Nevndarlimir:: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Varalimir: Erling Petersen fyri Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur

Onnur: Tummas Eliasen, kommunustjóri
Nevndarskrivari: Jensa Anthoniussen, protokollførari

Málsyvirlit			**Síða**
		Til viðgerðar	
13/13	13/00417	Fjarlestrardepil - val av limum í stýrið	
14/13	13/00187	Møgulig broyting - Brunanevnd til Tilbúgvingarnevnd	
15/13	10/00123	Útbygging av kirkjugarðinum úti í Bug - *eykajáttan, seinna viðgerð*	
16/13	13/00223	Lætti til barnafamiljur	
17/13	13/00600	Loyvi at røkja løgtingsarbeiðið og borgarstjóraarbeiðið samstundis - Jógvan Skorheim	

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

TIL VIÐGERÐAR

13/13
Fjarlestrardepil - val av limum í stýrið

Saksgang	Møtedato	Saknr
1 Mentanarnevndin 2013-2016	11.06.2013	18/13
2 Fíggjarnevndin 2013-2016	18.06.2013	23/13
3 Klaksvíkar Býráð 2013-2016	20.06.2013	13/13

Frágreiðing um málið:
Víst verður til tilmælið frá kommunustjóranum, dagfest 6. juni 2013.

Mentanarnevndin mælir á fundi 11. juni 2013 til:
- at skipað verður fyri innbodnari licitatión
- at eitt trímannaðstýri verður valt
- at kr. 100.000,- verða tiknar av "Kópakonuni" til endamálið

Fíggjarnevndin tekur á fundi 18. juni 2013 undir við Mentanarnevndini 11. juni 2013, og leggur aftrat, at:
- býráðsmeirilutin velur ein lim í stýrið
- býráðsminnilutin velur ein lim í stýrið
- triði limurin verður umboð fyri skúlaverkið

Tilmæli:
Býráðið verður at velja tveir limir í stýrið.

Býráðsins samtykt 20-06-2013:
Samtykt at velja Óluvu Klettskarð, Eyðstein Ó. Poulsen og Maiken Skarðenni (umboðandi skúlaverkið) í stýrið.

14/13
Møgulig broyting - Brunanevnd til Tilbúgvingarnevnd

Saksgang	Møtedato	Saknr
1 Tekniska Nevnd 2013-2016	12.06.2013	15/13
2 Klaksvíkar Býráð 2013-2016	20.06.2013	14/13

Frágreiðing um málið/ Lógargrundarlag:
Víst verður til tilmæli frá Umsitingini dagf. 6. mai 2013, hær mælt verður til at broyta Brunanevndina til eina Tilbúgvingarnevnd, í samband við nýggju lóggávuna um tilbúgving - Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012.

Fíggjarnevndini tekur tann 21. mai 2013 undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 6. mai 2013, og Klaksvíkar Býráð samtykti tann 23. mai 2013 at beina málið aftur í umsitingina at kanna, hvussu limakommunurnar velja umboð í nevndina, og at málið verður lagt fyri Teknisku Nevnd.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Staðfest er, at í samband við nýggju lóggávuna um tilbúgving - Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 - um tilbúgving er neyðugt at gera broytingar í kommunustýrisskipanini og í brunasamtyktini fyri Klaksvíkar Kommunu.
Í § 12, stk. 5, í nýggju tilbúgvingarlógini stendur, at "Kommunur, sum eru felags um kommunala tilbúgving, skulu hava felags Tilbúgvingarnevnd og felags tilbúgvingarleiðara. Í felags Tilbúgvingarnevndini situr ein meiriluti, sum kommunustýrini tilnevna, felags tilbúgvingarleiðarin og eitt umboð fyri Føroya Landfúta. Borgarstjóri er formaður."

Klaksvíkar kommuna samstarvar við aðrar kommunur í Norðoyggjum um tilbúgving, og tí er talan er um felags Tilbúgvingarnevnd.
Løgfrøðingur kommununnar hevur upplýst:

- at soleiðis sum hann skilur málið, noyðast ikki allar kommunurnar at hava umboð, men at tað er eitt krav kortini, at allar kommunurnar eru við til at velja umboðini,
- at í lógini er onki sagt um, hvussu stórt talið av nevndarlimum skal/kann vera, so tað kann kommunali myndugleikin laga til sjálvur,
- um býráðið hevur valt nevndina uttan at spyrja hinar kommunurnar í samstarvinum eftir, so kann kommunan sjálvandi rætta uppá málið ("lekja mangulin") við at kanna eftir, um tær kommununar í samstarvinum eftirfylgjandi kunna góðtaka valið. Eisini ber til at víðka nevndina við einum limi úr hvørjari samstarvskommunu.

Umsitingin kannar í løtuni spurningin um hinar kommununum í samstarvinum kunnu góðtaka valið, og vóna vit, at svar er komið innan fundin hjá Teknisku Nevnd tann 12. juni 2013.

Um so er, at hinar kommunurnar góðtaka valið, t.v.s., onki umboð at hava í Tilbúgvingarnevndini, so er bert neyðugt, at Føroya Landfúti velur umboð.

Um so er, at hinar kommunurnar vilja hava umboð, so er neyðugt at velja limirnar umaftur, ella at víðka nevndina við limum úr samstarvskommununum. Sum nevnt er onki sagt um, hvussu stórt talið av nevndarlimum tá skal vera, men kommunustýrini skulu hava meirilutan í nevndini.

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið hevur bert fíggjarligar avleiðingar um so verður, at fleiri enn 5 nevndarlimir verða valdir í nýggju Tilbúgvingarnevndina.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri Teknisku Nevnd, og vóna vit, at limakommunurnar hava svarað áðrenn fundin hjá Teknisku Nevnd.

TN 12-06-2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagfest 6. juni 2013, og mælir leiðsluni til at skunda undir at rykkja hinar limakommunurnar eftir svari innan býráðsfundin 20. juni 2013.

Býráðsins samtykt 20-06-2013:
Tilmælið dagfest 6. juni 2013 samtykt tó við teirri treyt, at Viðareiðis kommuna tekur undir við Tilbúgvingarnevndini, soleiðis sum málið fyriliggur.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

15/13
Útbygging av kirkjugarðinum úti í Bug - *eykajáttan, seinna viðgerð*

Saksgang	Møtedato	Saknr
8 Klaksvíkar Býráð 2013-2016	23.05.2013	11/13
9 Klaksvíkar Býráð 2013-2016	20.06.2013	15/13

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 23. mai 2013. Av misgáum stóð á býráðsskránni, at talan var um seinnu viðgerð. Talan var veruliga um fyrru viðgerð. Tí verður eykajáttanin løgd fyri býráðið til seinnu viðgerð á hesum sinni.

Býráðsins samtykt 20-06-2013:
Staðfest, at TN hevur játtað kr. 150 tús., MeN kr. 30 tús., SoN kr. 50 tús. og BBN kr. 100 tús.
Málið samtykt.

16/13
Lætti til barnafamiljur

Saksgang	Møtedato	Saknr
1 Sosiala Nevnd 2013-2016	17.06.2013	15/13
2 Fíggjarnevndin 2013-2016	18.06.2013	28/13
3 Klaksvíkar Býráð 2013-2016	20.06.2013	16/13

Frágreiðing um málið:

Notat til Sosialu Nevnd – til eykafundin 17. juni 2013 kl. 17:00

Á seinasta fundi samtykti nevndin fylgjandi:

SoN 11.06.2013: Vísandi til tilmæli frá umsitingini, dagfest 10. juni 2013, ynskir nevndin at fáa nøkur viðurskifti nærri lýst til ein eykafund hjá nevndini, sum verður áðrenn fíggjarnevndarfundin, herundir tal av børnum, sum ikki eru í ansingarskipanini, kostnaður í øðrum kommunum og spurningin um systkinaavsláttur.

Tal av børnum, sum ikki eru í ansingarskipanini:

	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	ÍALT
Børn undir skúlaaldur, fødd í KK	65	63	56	71	48	69	13	385
Børn í ansingarskipanini hjá KK	63	61	55	66	42	69	00	356
Tvs. børn í KK, sum ikki eru í ansing	2	2	1	5	6	0	13	29

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Systkinaavsláttarskipanin er henda – sambært "Upptøkureglum til barnaansing í KK":

§11 *Hava foreldur fleiri børn í ansing, gjalda tey fult fyri dýrasta plássið og 80% fyri systkinini.*

Systkin eru: Biologisk systkin, ið bæði búgva hjá antin faðir ella móðir, ið hevur foreldramyndugleikan. Ættleidd systkin, stjúksystkin, sum hava sama bústað sambært fólkayvirlitið.

Búgva foreldrini ikki saman, men hava felags foreldramyndugleika, verður barnið roknað sum systkin, har barnið býr sambært fólkayvirlitinum, óansæð um barnið býr líka leingi hjá báðum foreldrunum.

Sigrun Vágstún, barnaansingarsamskipari, kemur inn á eykafundin at greiða nærri frá og at svara evt. spurningum frá nevndarlimum.

Foreldragjøld í øðrum kommunum:

Umsitingin hevur biðið hinar kommunurnar í KSF um at fáa upplýst teirra foreldragjøld í barnaansingini, og hava niðanfyri standandi kommunur svarað:

Vágs Kommuna – gjøld í ansing 2013 :

	Fulla tíð	Hálva tíð
Vøggustova :	1.700	900
Barnagarður :	1.700	900
Frítíðarskúli :	1.700	900
Dagrøkt :	1.500	800

Tvey tey fyrstu børnini gjalda fult gjald, nr. 3 betalir 50% og nr. 4 betalir 25%.
VK hevur latið upp nýggjan stovn hálvan mai. Øll børn uttan dagrøktarbørnini eru í nýggja stovninum.

Tvøroyrar Kommuna – foreldragjøldini fyri barnaansing eru:

Dagrøkt undir 3 ár:	2.000,-
Dagrøkt yvir 3 ár:	1.800,-
Vøggustova:	2.650,-
Barnagarður:	2.100,-
Útibarnagarður:	1.800,-
Frítíðarskúlin:	1.200,-

Gjaldið verður kravt yvir 12 mør. um ári fyri alla ansing uttan frítíðarskúlan.

Vit hava skipan við systkinaavsláttri, til familjur, ið hava 2 ella fleiri børn í ansing. Tá betalir dýrasta plássið fult gjald, síðan fáa tey -25 % av bíligasta plássinum og hareftir -50 %, um tey hava fleiri børn í ansing.

Fuglafjarðar Kommuna – foreldragjøldini fyri barnaansing eru:

Galdandi frá 01. januar 2013:

Vøggustovupláss	kr. 2.200,00
Barnagarðspláss	kr. 1.700,00
Frítíðarskúli.	kr. 950,00

3. barnið verður bíligast, og koma foreldur einki at gjalda fyri hetta ansingarpláss.

Gjøldini verða rindað yvir 11 mánaðar.

Tórshavnar Kommuna – foreldragjøldini fyri barnaansing eru:

Vøggustovupláss kr. 2.401 um mánaðin í 11 mánaðir um árið.
Barnagarðspláss kr. 1.494 um mánaðin í 11 mánaðir um árið.
Frítíðarskúla kr. 821 um mánaðin í 10 mánaðir um árið.
Dagrøkt kr. 2.401 um mánaðin í 11 mánaðir um árið, fyri børn í vøggustovualdri.
Frítíðarskúla á Miðstovninum kr. 1.121 um mánaðin í 11 mánaðir um árið.
Forskúlabørn í frítíðarskúla kr. 961 um mánaðin í 10 mánaðir um árið.

Fíggjarligar avleiðingar:

Sí frágreiðing.

Tilmæli:

Til politiska støðutakan.

SoN 17-06-2013: Ein meiriluti í nevndini, Jóhann Lützen, Steinbjørn O. Jacobsen og Signhild V. Johannesen, tekur undir við, at kommunan veitir barnafamiljum ein lætta, sum útgreinað í skrivi frá umsitingini, dagfest 7. juni 2013.
Ein minniluti, Eyðstein Ó. Poulsen og Herfrí Sørensen, tekur undir við, at lætti verður veittur, men mælir til at varðveita/styrkja systkinaavsláttarskipanina, soleiðis at lættin kemur teimum mest tørvandi tilgóðar, vísandi til, at aðrar kommunur hava slíka samhaldsfastar skipanir. Minnilutin ynskir tí málið nærri lýst, og mælir tí til at beina tað aftur í umsitingina til útvegan av fleiri upplýsingum.

FíN 18-06-2013: Nevndin tekur undir við skrivi frá umsitingini, dagfest 17. juni 2013, og at systkinaavslátturin verður varðveittur og hækkaður úr 20% upp í 25%.

Býráðsins samtykt 20-06-2013:
Samtykt.

17/13
Loyvi at røkja løgtingsarbeiðið og borgarstjóraarbeiðið samstundis - Jógvan Skorheim

Saksgang	Møtedato	Saknr
1 Klaksvíkar Býráð 2013-2016	20.06.2013	17/13

Frágreiðing um málið:

Borgarstjórin, Jógvan Skorheim, hevur í skrivi dagf. 12 juni 2013 søkt Klaksvíkar Býráð um heimild til at taka sæti í Løgtinginum, tá ið tørvur er á tí.

Lógargrundarlag:
Í kommunustýrislógini kapittul 2 § 6. stk. 2 er fyriskrivað, at um setanarbrøkurin hjá borgarstjóranum er 1/1, skal hann tá ið hann er valdur leggja øll borgarlig størv frá sær umframt øll álitstørv, sum ikki hava beinleiðis samband við starvið sum borgarstjóri. Kommunustýrið kann loyva frávik frá regluni í pkt 4, tá ið umræður størv sum eru beinleiðis fólkavald.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar fíggjarligar avleiðingar

Tilmæli:
Býráðið skal taka støðu til umsókn frá borgarstjóranum um heimild til at taka sæti í Løgtinginum. Vísandi til skriv frá borgarstjóranum dagf. 12. juni 2013.

Býráðsins samtykt 20-06-2013:
Samtykt at loyva Jógvani Skorheim at taka sæti á Løgtingi fram til 1. jan. 2014 við 6 atkvøðum fyri - Kristian E. Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Jóhann Lützen, Óluva Klettskarð, Steinbjørn O. Jacobsen og Jógvan Skorheim - og 5 atkvøðum ímóti - Herfrí J. Sørensen, Atli S. Justinussen, Erling Petersen, Eyðstein Ó. Poulsen og Gunvá við Keldu.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI